# Flott uppgáva um listaskúla



*Modellið av listaskúlanum sæst her úr erva. Skúlin hevur flagtak, og tað gevur bygninginum eitt samspæl við náttúruna.*

*Her sæst modellið úr erva uttan tak. Bygningurin er gjørdur í fláum. - Longri uppi á fjallinum sæst grótkanturin, og tí haldi eg, at tað riggar væl, at bygningurin er í fláum, sigur Nina. ( mynd Jens Kr. Vang )*



**27 ára gamla Nina Alberg Arge úr Havn er akkurát liðug at lesa til arkitekt. Endaliga verkætlanin hjá henni var, at gera eitt dømi um, hvussu listaskúlin í Sandi kundi sæð út. – Føroyska náttúran gav mær íblástur, og brattlendið er ein spennandi avbjóðing, sigur Nina**

ARKITEKTUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Nina Alberg Arge, 27 ár, er akkurát vorðin liðug sum arkitekt. Nina gjørdi av, at hon skal vera arkitekt, tá ið hon gekk í studentaskúla. Tá ið hon var vorðin studentur, fór hon niður á listaskúla í eitt ár, har ið hon valdi arkitektur-linjuna. Eftir hetta fór hon at lesa til arkitekt í Århus. Hon gjørdist liðug í summar eftir fimm ára lestur.

Nina sigur, at arkitektur-útbúgvingin er mest bygd uppá at stimbra tín kreativitet. Tey hava eisini teori, men tað er ikki so nógv. Tað verður arbeitt sera nógv við verkætlanum. Endaliga verkætlanin hjá Ninu er eitt modell av tí ætlaða listaskúlanum á Sandi. Hon hevur tikið útgangsstøði í einari frágreiðing, sum ein útvald nevnd hjá undanfarna landsstýrið hevur skrivað.

## Íblastur úr Sandi

Nina hevði hugsað um ymiskar møguleikar til endaligu uppgávuna, men til endans valdi hon listaskúlan á Sandi. Tað var nógv frammi um skúlan fyri nøkrum árum síðani, men nú er ikki so nógv at hoyra til hann. Tað er helst tí, at nýggj samgonga er komin, sum ikki raðfestir listaskúlan líka frammarlaga sum undanfarna.

- Eg hugsaði, at tað kundi verið spennandi at gjørt eitt uppskot um, hvussu listaskúlin kann síggja út. Tað er eisini ein politisk síða av tí, sum er spennandi. Kanska kann hendan uppgávan birta kjakið um listaskúlan aftur, sigur Nina.

Sandoyarfólk vístu áhuga fyri verkætlanini, og tey fara eisini at sýna uppgávuna fram á Sandi.

Eg haldi, at tað hevði verið eitt gott hugskot við einum tílíkum skúla. Tað kann styrkja samleikan hjá føroyskum listafólkum.

Men eg vil ikki leggja meg í politiska kjakið um skúlan. Eg valdi at gera uppgávuna um skúlan einans orsakað av teimum fakligu avbjóðingunum. Tað var als ikki av hugsjónarligum orsøkum, sigur hon.

## Møgulig inntøkukelda

Nina hevur sjálv gingið á listaskúla í Danmark, og hon heldur, at tað kundi verið ein styrki hjá Føroyum at fingið ein listaskúla.

Tað er sjálvandi sunt at fara av landinum, men kanska summi ikki koma heim aftur. Í Danmark er ikki alt, sum tú lærir viðkomandi fyri føroyingar, tí at vit hava eitt øðrvísi umhvørvi og eina øðrvísi mentan enn danskarar.

Ein tílíkur skúli kundi verið eitt listaumhvørvi, har ið tann føroyski listasamleikin verður hjúklaður. Eisini kundi vit fingið íblástur frá útlendskum listafólkum, sum kunnu koma henda vegin at undrivísa.

Nina heldur, at listin kann gerast ein møgulig inntøkukelda hjá føroyingum. Men tá er týdningarmikið, at hon verður stimbrað.

## Fellur inn í landslagið

Modellið hjá Ninu liggur norðan fyri bygdina. Staðið hevur hon valt, tí at tað er brattlendið, og tað er veðurgott. Modellið er sera vakurt við flagtakið og nógvum rútum.

Tá ið hon fór í starvsvenjing, valdi hon at fara til Norra, tí at har arbeiða tey nógv við brattlendi. Hetta gjørdi hon miðvíst fyri at kunna fáa kunnleika við lendi, sum er líkt tí føroyska.

- Í skúlanum í Danmark arbeiddu vit als ikki við, hvussu lendið er, tí at har er næstan allastaðni púra